Fleiri rásir - einki roks

# Skúlamaturin hjá Jamie

**Á TvDanmark mánakvøldið kl. 19.00**

Nýggja matsendirøðin við heimskenda kokkinum Jamie Oliver, "Skúlamaturin hjá Jamie", er varpað út, og mánakvøldið er fjórði parturin á skránni hjá TvDanmark. Í hesi sendirøðini ætlar hann at gera mat til 20.000 skúlabørn í kantinum kring allan London - skúlabørnini fáa ov feitan og ósunnan mat, heldur Jamie, og hetta ætlar hann at gera nakað við. Hesin parturin: Ferian er liðug og børnini eru aftur í skúla. Nú skulu kantinudamurnar vísa tað tær hava lært í feriuni. Og Jamie er sjálvandi spentur at vita, hvat børnini fara at siga til matin. Men áðrenn komið verður so langt hópa trupulleikarnir seg upp. M.a. er tað leverandørarnir, ið ikki gera sítt arbeiði til fulnar. Jamie Oliver hevur nógv at hugsa um og hann stúrir. Fara kantinudamurnar at liva upp til tey høgu krøvini, ið sett eru? Hvat nú um børnini ikki verða mett, og foreldrini sláa nevan í borðið? Hvat nú um verkætlanin heilt miseydnast, er Jamie Oliver so ein ferdigur maður? Meistarakokkurin er í døpurhuga, og nú skal hann eisini inn at fundast við bretsku stjórnina. Hann skal sannføra politikararnar um at stuðla verkætlanini og somuleiðis um at banna junk-food ella grillmati á skúlunum. Um hann fær politiskan stuðul, er ætlanini at gera eina heildarætlan, ið skal hjálpa landsins kantinudamum at gera betri og heilsusterkari mat til skúlabørnini. Men fer hetta at eydnast honum?...




*Er Jamie Oliver ein ferdigur maður? Í fjórðu sending hevur Jamie Oliver nógv at hugsa um, hann er í døpurhuga - einki gongur til vildar. Fer ambitiøsa verkætlanini hjá honum fyri skeytið?*

**Á TV3 týskvøldið kl. 20.45**

# Frá ruski til slott (15)

Jú meiri tey koyra burtur, jú fleiri pengar fáa tey til at gera dreymaíbúð teirra til veruleika! Fyri hvørt kiloið av innbúgvi, ið familjan koyrir í ruskbingjuna, so fær familjan 50 krónur. 1000 kg. geva soleiðis 50.000 kr. Hvørt týskvøld stilla tey í sendingini "Frá ruski til slott" eina ruskbingju í túni hjá eini familja við stórum íbúðardreymum. Hesaferð hitta vit familjuna Laouir. Said Laouir hevur nokk at gera við at reka matstovu mitt í Keypmannahavn, og konan Jeanette hevur eisini nokk at gera við at ansa eftir heiminum í Hvidovre og teirra trimum børnum. Tey hava hvørgan tíð ella ráð at byggja um og broyta heim teirra. Tey hava ætlað sær at gera nýtt kamar til Chanel, tey hava ætlað sær at ríva veggir niður og so skal hin reyði 70ara-køkurin umgerast til eitthvørt, ið familjan kann vera glað fyri. Said fær sær frí, og tey fara í holt við at fylla ruskbingjuna - og við fimm tímar seinni hava tey fylt reyðu ruskbingjuna. Húsið er næstan tómt, og tey hava nú brúk fyri serkønari hjálp. Meðan familjan fer á hotel at hvíla seg, fara sniðgevin Dorte Arhøj og hondverkarar at gera parcelhúsið í Hvidovre um til eitt slott og tey hava einans tveir dagar.



*Týskvøldið er tað heimið hjá Jeanette og Said Laouir, ið fer ein umgang*



*Mai-Britt er vertur í sendingini "Frá ruski til slott". Nýggi sendihálva við sendingini byrjar 14. septembur, tá verða fleiri góð ráð at heinta til íbúðina ella húsini*